Fylgiskjal 1

Uttanríkis- og vinnumálaráðið

Dagfesting: 14.08.2025
Mál nr.: 25/0885
Málsviðgjørt: SSJ

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	**Løgtingslógaruppskotið**
	§ 1. Í løgtingslóg nr. 90 frá 17. mai 2022 um avmarkandi tiltøk í sambandi við atgerðir móti Ukraina, sum broytt við løgtingslóg nr. 82 frá 22. juni 2023, verða gjørdar hesar broytingar:
“ Løgtingslóg um avmarkandi tiltøk í sambandi við atgerðir móti Ukraina”	1. Heitið á løgtingslógini verður broytt til: “Ávís avmarkandi tiltøk”
	2. Í § 1, § 3, stk. 1 og 3, § 4, stk. 1 og 4, § 5, § 6, stk. 2, § 9, § 10, stk. 2, og § 11, stk. 2, verður “landsstýrismaðurin” broytt til “landsstýrisfólkið”.
§ 7. Likamligir persónar, búsitandi í Føroyum og løgfrøðiligir persónar, skrásettir í Føroyum, ið meta, at teir av órøttum eru settir á lista við persónum, ið eru fevndir av tiltøkum, sett í gildi við heimild í hesi løgtingslóg, kunnu lata landsstýrismanninum skrivliga umbøn um at verða strikaðir av listanum.	3. Í § 7 verður “landsstýrismanninum” broytt til “landsstýrisfólkinum”.

"Onnur tiltøk"	4. Yvirskriftin frammanfyri § 5 verður orðað soleiðis: "*Onnur tiltøk í sambandi við atgerðir móti Ukraina*"
	5. Aftaná § 5, men frammanfyri yvirskriftina til § 6 verður sett: "*Onnur tiltøk* **§ 5 a.** Landsstýrisfólkið kann áseta nærri reglur um onnur tiltøk mótvegis Russlandi og Hvítarusslandi enn tey, ið eru nevnd í §§ 1, 3 og 4 við støði í avmarkandi tiltøkum samtykt av millumtjóða felagsskapum, ella sum hava breiða millumtjóða undirtøku, og sum hava til endamáls at tryggja frið og trygd ella virðing fyri fólkaræði, rættarsamfelagi, mannarættindum ella altjóðarætti annars."
§ 8. Løgtingslóg um fyrisitingarlóg § 18 er ikki galdandi fyri avgerðir tiknar sambært reglum ásettar við heimild í § 4 og fyri upptøku av likamligum persónum, løgfrøðiligum persónum, eindum o.ø. á listar sambært § 6.	6. § 8 verður orðað soleiðis: "Løgtingslóg um fyrisitingarlóg § 18 er ikki galdandi fyri avgerðir tiknar sambært reglum ásettar við heimild í §§ 4 og 5a, og fyri upptøku av likamligum persónum, løgfrøðiligum persónum, eindum, o.ø. á listar sambært § 6."
§ 10. Er ikki hægri revsing ásett í aðrari lóggávu, verður við sekt ella fongsli upp í eitt ár, ella undir skerpandi umstøðum fongsli upp í tvey ár, revsaður tann, sum tilætlað ella av grovum ósketni brýtur ásetingar í ella við heimild í §§ 3-5.	7. Í § 10, stk. 1 verður "§§ 3-5" broytt til §§ 3-5 a".
	§ 2. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.